# Árni G! á G!

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Í ár fer Árni Gregersen enn einafer at vísa Føroya fólki, at honum dámar best mitt í rokanum, hesaferð á G! 2005. Sum Frásøgumaður á lítla pallinum á G!, fer Árni at seta dám á festivalin, við góða og lætta lyndi sínum. Spennandi verður at lýða á skapandi tónaódnirnar og listarligu plettskotini, ið Árni fer at lýsa í vælvaldum orðum og vendingum.

Vit munnu helst øll minnast herviligu jólaódnina, ið gjørdi um seg á vetri í 1988. Tá ódnin var uppá tað harðasta, valdu flestu føroyingar at fara oman í kjallarin at verja seg. Tó var tað ein, sum, heldur enn at goyma seg, valdi at fara út í illveðrið, at fylgja við hvat hendi í Havnini og aðrastaðni.

Tað var Árni Gregersen, sum í sínum starvi á SVF, fór út við Jeepinum, at vita hvar teir skuldu fara at taka upp dagin eftir. Vit minnast Árna, flaksandi á skerminum, greiða frá ruðuleik-anum í Havn og kring landið.

Í 1990 var Árni somuleiðis hjástaddur í ruðuleikanum, tá føroyska landsliðið, við einum plettskoti frá Torkili Nielsen, legði seg á odda 1-0 frammanfyri Eysturríki. Ja, vit kunnu enntá siga at Árni sjálvur átti sín leiklut í ruðuleikanum, við eini sjónvarpsfráboðan, ið var bæði glað, peppað, uppøst, garvill og kenslu-borin. Tá sigurin var vorin veruleiki eftir loknan dyst kundi tað bara staðfestast at ótrúligu sjónvarps-myndirnar høvdu tosa sítt greiða mál. Tó var tað inniliga og lívliga fráboðanin hjá Árna, ið gav myndunum dám, kenslu og lit.



Árni Gregersen er føddur í Gøtu. Hann fór niður at lesa til journalist á Danmarks Journalisthøjskole, har hann fekk prógv í 1976. Árni starvaðist sum tíðindamaður í Sjónvarpi Føroya frá 1984 til 1995 og tókst eisini við ymiskan tíðindaflutning og undirhald í Útvarp Føroya, Dagblaðnum, og 14. September.

Í 1995 flutti familja Gregersen til Bornholm og í Danmark hevur Árni starvast á Vendsyssel Tidende, BT og TV 2/Bornholm, har hann enn er í dag. Spurdur hvat Árni heldur um G!, svarar hann so-leiðis: "Eg gleði meg til G!. Havi bara lisið og hoyrt um festivalin. Nú sleppi eg at hjálpa til. Tað verður cool!".

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag, fríggjadagin og leygardagin:**
Lot til andøvsgul av norði, turt og sólglottar. Hitin millum 14 og 18 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Lot til andøvsgul av landnyrðingi og eystri, ella av ymsum ættum, turt og sólglottar. Hitin millum 14 og 18 stig.

Miðalhitin í juni var nær miðal yvir 30 ár 9,2 móti 9,0.
Avfallið var 73,4 mm. móti miðal 66,0

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 16 |
| Nuuk | 8 |
| Qaqortoq | 8 |
| Ammassalik | 8 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 14 |
| Seyðisfjørður | 11 |
| Tórshavn | 14 |
| Lerwick | 13 |
| Aberdeen | 14 |
| London | 21 |
| Tromsø | 18 |
| Bergen | 15 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 21 |
| Keypmannah. | 21 |
| Helsinki | 21 |
| Moskva | 24 |
| Berlin | 22 |
| Warzawa | 21 |
| Kiev | 20 |
| Bukarest | 26 |
| Paris | 20 |
| Madrid | -- |
| Róm | 26 |
| Malorca | 29 |
| Athen | 32 |
| Malta | 33 |
| Tunis | 34 |
| Beijing | 34 |
| New Dehli | 33 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | 15 |
| New York | 33 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | 24 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | 28 |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 12 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 1000 hPa. við Oslo fer spakuliga suðureftir og brúgvalagið haðani til Føroya fer í landsynning.




**Í dag:**
Hátrýstið við Írland stendur mestsum í stað og ein hátrýstryggur til Íslands gevur væntandi góðveður á okkara leiðum komandi dagarnar.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 19/7 kl. 06[00]– 20/7. 06[00]. Hitin í gjár: 12,8°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 25,6°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,5 mm – mált frá 19/7 kl. 06[00]– 20/7 kl. 06[00]
Avfallið higartil í juli: 44,1 mm

**Vika 28 – 17. juli**

1. Centrum:
**33 - 22 - 57 - 13 - 15 - 19 - 27 - 48**

1. Ramme:
**54 - 72 - 46 - 40 - 04 - 71 - 20 - 24 - 42 - 62 - 66 - 49 - 38 - 39 - 52 - 65 - 59 - 32 - 07 - 51 - 05 - 37 - 41 - 50 61 - 60 - 75 - 06 - 17 - 64 - 67**

Fuld plade:
**69 - 18 - 73 - 14 - 58 - 34 - 01 - 63**

Fri spil: **B_XE_**

| | | |
|---|---|---|
| Fuld plade: | 1. pr. | **114.549,- kr.** |
| 1. Ramme: | 2. pr. | **19.774,- kr.** |
| 1. Centrum: | 3. pr. | **9.902,- kr.** |
| Ramme: | 4. pr. | **494,- kr.** |
| Centrum: | 5. pr. | **28,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

Sosialurin

## VESTFALLSKYRRINDI

**21. juli** — **Fullmáni/mánin næstur jørðini**

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmanna-sundi fp. | Vestmanna-sundi sp. | Mykines-firði fp. | Mykines-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 21. Juli | 07.10 | 19.41 | 06.10 | 18.41 | 06.25 | 18.56 | 09.10 | 21.41 | 10.10 | 22.41 |
| 22. Juli | 08.12 | 20.40 | 07.12 | 19.40 | 07.27 | 19.55 | 10.12 | 22.40 | 11.12 | 23.40 |
| 23. Juli | 09.09 | 21.35 | 08.09 | 20.35 | 08.24 | 20.50 | 11.09 | 23.35 | - | 12.09 |
| 24. Juli | 10.01 | 22.25 | 09.01 | 21.25 | 09.16 | 21.40 | - | 12.01 | 00.35 | 13.01 |
| 25. Juli | 10.50 | 23.12 | 09.50 | 22.12 | 10.05 | 22.27 | 00.25 | 12.50 | 01.25 | 13.50 |

| Dagur | Nólsoyar-firði fp. | Nólsoyar-firði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvanna-sundi fp. | Hvanna-sundi sp. | Fugloyar-firði fp. | Fugloyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 21. Juli | 05.25 | 17.56 | 04.25 | 16.56 | 07.25 | 19.56 | 08.25 | 20.56 | 06.55 | 19.26 | 08.10 | 20.41 |
| 22. Juli | 06.27 | 18.55 | 05.27 | 17.55 | 08.27 | 20.55 | 09.27 | 21.55 | 07.57 | 20.25 | 09.12 | 21.40 |
| 23. Juli | 07.24 | 19.50 | 06.24 | 18.50 | 09.24 | 21.50 | 10.24 | 22.50 | 08.54 | 21.20 | 10.09 | 22.35 |
| 24. Juli | 08.16 | 20.40 | 07.16 | 19.40 | 10.16 | 22.40 | 11.16 | 23.40 | 09.46 | 22.10 | 11.01 | 23.25 |
| 25. Juli | 09.05 | 21.27 | 08.05 | 20.27 | 11.05 | 23.27 | - | 12.05 | 10.35 | 22.57 | 11.50 | - |

5 707265 100043 >